# Tøkk

Ein hjartans tøkk til øll tykkum, sum á ymsan hátt vístu okkum samkenslu, tá kæra kona mín, móðir, verðmóðir og omma okkara

**Marita Sámalsdóttir Petersen**

doyði og varð jarðað.

Takk fyri tey vøkru minningarorðini og tøkk til øll tykkum, sum fylgdu, og tykkum, sum vóru við til at gera jarðarferðina til eina hátíðarløtu.

*Fyri okkum avvarðandi*

**Kári**

# Tøkk

Øllum tykkum, sum gjørdu mær 85 ára føðingardagin 13. november ógloymandi, takki eg hjartaliga. Harrin signi tykkum.

*Kærastu heilsanir*

**Hjørdis Háberg**

## Til minnis um
# Mikkjal Sjúrð Olsen

Eitt summar er farið og heystið við,
nú hvítnaðir eru tindar,
og dagarnir styttast, ja árið við,
nú harnast í hvørjum vindar.

Tú sjólívið valdi, tá ungur tú vart,
tú køvt hevur mangt eitt ælið,
so róligur vart, teg sjálvan ei spart,
um annar so fór eftir hæli.

So tungt tað er at siga farvæl,
mín einkar frændi kæri,
av fólki tú dámdur varð sera væl,
tað vísti tann stóri skari.

Tín fjørður er rógvin, ei langur hann varð,
tað Harrin eina man ráða,
um fjørðurin oftani knortluttur var,
tú hvíld í Himli skal fáa.

**Ein vinur**

# Tøkk



Eg takki hjartaliga fyri stuðul til Sambandsflokkin, harumframt vil eg eisini takka persónliga 319 ferðir fyri dygga álitisváttan, sum mær var givin runt Føroya land.

*Vinarliga*

**Kaj Leo Johannesen**
**Sambandsflokkurin**



# Ein tjóðveldismaður fyllir 95

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Í Føroyum eiga vit nógvar politiskar vingliskøltar, sum rekast í politiska meldrinum, alt eftir hvar teir sjálvur kunnu fáa mest burturúr. Hesir eiga onga hugsjón, eru ikki støðufastir og halda við fjøldini. Lurta fyrst eftir hvat fjøldin heldur, manna seg so upp og siga hart sína meining, neyvt lagað eftir tí sum tey flestu halda, gera meiningarnar hjá fjøldini til sínar egnu.

Men vit eiga eisini nakrar í øllum flokkum, sum tora at standa við sínar meiningar og sum verða riknir av eini hugsjón heldur enn heldur enn av tevjani av matarosa og Andrias í Tarti í Oyndarfirði er ein teirra. Í dag fyllir hann 95 ár. Hann er enn byrgur hóast sjónin er farin og tey blíva so vælsigna og gomul, systkinnaflokkurin Andrias er úr.



*Myndin er tikin í gjár og Andrias er enn fimur á fótum.*

*Mynd: Jon Ingi Eidesgaard*

Andrias er ein tjóðveldismaður, so tað brakar eftir í. Ikki ein, sum er lopin upp í, nú tjóðveldisflokkurin hevur havt so stórt viðrák seinastu árini. Nei hann hevur verið við alla tíðina. Eisini tá flokkurin hevur ligið í mótráki, tá hann hevur verið lítil og hevur litið havt at siga. Andrias hevur verið tjóðveldismaður, síðan flokkurin varð stovnaður og tað skuldi ikki undrað, at tjóðveldismaður kom at standa á sjálvum gravsteininum, tá ið hann, eins og vit øll onnur, halda leiðina mót vestri.

Andrias hevur virðing fyri sínum medmenniskjum, men potitisku hugsjónina hjá sambandsmonnum, heldur hann einki um. Hann skilir ikki, at nakar í heilatikið kann vera sambandsmaður, hetta er so fullkomiliga vitleyst í hansara hugaheimi.Ikki at vilja standa á egnum beinum, og tað sum harmar hann mest, er, at menn í bygdini, men sum hava ávirkan á fjøldina, skulu bekenna seg til sambandið, bara tí at forfedrarnir gjørdu tað, sum reinan arv og einki annað. Í hansara hugaheimi liggur ikki tað minsta av sjálvstøðugari hugsan aftanfyri at vera sambandsmaður, bert ein endurtøka at undarfarnum ættarliðum.

Og javnaðarmennirnar tekur hann ikki upp á tunguna, tíansheldur fólkaflokkin, hóast hann helst sjálvur er sprottin úr hesum ella Gamla Sjálvstýri á ungum døgum.

Men illa hevur gingið hjá Andriasi at boða tjóðveldisboðskapin í bygdini, tí enn er sambandið sterkt og so hevur javnðarflokkurin havt tann frekleika at troðka seg framat seinnu árinivið eini hugsjón, ið bert botnar í breyði, berari verðsligari fáfongd, svøvni, leti og vágaloysi.

Lívið, knoss og mótgangur hevur brýnt Andrias. Hann har úr stórum barnaflokki í Tarti. Korini vóru smá. Hann royndi seg sum skipaeigara í ringum tíðin, fór at húsagang og knossaði seg uppaftur. Hann hevur verið ein knassi á sjónum. Varð nærum ikki tikin við snørinum og tað eru fáir pensionistar í landinum, sum hava vunnið fleiri krónur enn júst Andrias. Hann knossaðist sum landformaður á útróðrarbárinum Nósa í Oyndarfirði í mong ár. Hann var gull verdur hjá okkum smádreingjum. Hann grenjaði nakað, men legði tað góða í okkum og tað er vinsæla millum hann og teir yngru. Vit hava nógv at takka honum fyri, og tú fer ríkaður frá honum, tá tú hittir hann á veg til handils.

Hjartaliga tillukku við degnum.





OLJUTINGIÐ

# Jólatingið 2001

Vit bjóða til Jólating, 5. desember á Hotel Føroyum kl. 18.30.
Umframt kulinariskar delikatessur, borðreiða vit við kveikjandi hugleiðingum.

**Ólavur Gregersen** heldur fyrilestur um alheims oljufelagið AGIP og AGIP FØROYAR.
Undir heitinum **"Óli eftir Eftar"** hugleiðir **Robert McBirnie** um føroysku oljuvinnuna við støði í tekningunum hjá Óla P.
Vinarliga tekna teg í Vinnuhúsinum á telefon 3 118 64 - ella um teldupost industry@industry.fo í seinasta lagi 3. desember. Vælkomin

Vinarliga
Oljutingið



